Marianne Gade

Kaspur og jólamaðurin

Leikarar:

Kaspur _____

Prinsessan _____

Jólamaðurin _____

Jansson _____

Ein kettlingur _____

Týtt hevur 10. a á Venjingarskúlanum 1983/84

Lærari: Paulivar Andreasen

Eitt sindur um sjónleika-venjing við børnum

Fyrst verður leikurin lisin upp í síni heild. Roynt verður at gera leikin so spennandi hjá børnunum sum gjørligt.

Síðani verður ein mynd vand í senn. Børnini kunnu spæla ein part nakrar ferðir við ongum handriti (improvisatión), har børnini skiftast at hava teir ymsu leiklutirnar. Um lærarin velur »skeivt« fyrstu ferð, kann tað verða trupult at skifta seinni og ikki særa okkurt av børnunum.

Tá ið børnini hava spælt leikin nakrar ferðir og hava *skilt gongdina* í leikinum, verða leiklutirnir ásettir og handrit býtt út. — Nú verður heitt á børnini um at læra seg leiklutin uttanat.

Nú er so at vóna, at børnini sjálv duga at síggja, at summi hóska best til ein leiklut, onnur til onkran annan.

Tað hevur eisini stóran týdning at fáa børnini at skilja, at allir leiklutir eru týdningarmiklir; tey, sum arbeiða aftanfyri á pallinum, har alt skal gerast stundisliga og stillisliga, hava eins stóran týdning og tey, sum standa á palli.

Tað er heldur ikki bara tey, sum siga okkurt beint nú — ella skulu siga nógv í leikinum — sum eru týdningarmikil. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann leggja nógv afturat leikinum, um hann spælir væl í røttu løtu. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann taka nógv frá leikinum, um hann dregur ov nógv eygu at sær, tá ið hann ikki skal.

Fyrstu ferð, ið vant verður rættiliga á palli, skulu børnini læra at arbeiða aftan fyri pallin og ikki larma. Tað loysir seg at brúka nógva tíð til at venja hetta.

Royn skjótast gjørligt at áseta, hvar leikarin skal ganga og standa, tá ið hann skal siga okkurt. Tá festa setningarnir seg betur, og leikararnir vera tryggari.

Ven børnini frá byrjan at venda sær ímóti áskoðarunum, tá ið tey tosa, og at tosa *nógv* harðari og týðiligari, enn tey halda seg skulu.

Hini børnini kunnu fara oman í salin at eygleiða og lurta, um tað hoyrist nóg væl.

Royn at fáa børnini *ikki* at skunda sær. Onkuntíð hevur tað, at steðga á, mest at siga.

1. partur

Kaspur: Góðan dag, børn. Ja, nú koma jólini skjótt, og eg havi bíðað og bíðað eftir jólamanninum í allan dag. So nú eri eg ógvuliga móður. Eg haldi, eg fari at leggja meg eina løtu og fáa mær ein lúr. So mugu tit lova at vekja meg, tá ið hann kemur. *(Leggur seg og snorkar)*

Prinsessan: *(kemur inn grátandi)* Kaspur, sum tað er ræðuligt! Posin hjá jólamanninum við øllum jólagávunum í er stolin, ella hevur jólamaðurin kanska mist hann. Og eg, sum hevði ynskt mær eina lítla kisku í jólagávu. *(grætur)*

Kaspur: Ja, men lítla prinsessa, hvussu veitst tú alt hatta?

Prinsessan: Eg havi beint nú møtt jólamanninum, og hann segði mær, at posin var burtur, og hann visti ikki, hvar hann var.

Jólamað.: *(kemur har)* Alt er rætt, sum tit hava hoyrt, børn. Nú veit eg ikki, hvat eg skal gera. Hugsa um børnini, sum so spent sita og bíða eftir mær. Og tað ringasta av øllum er, at tað er so leingi at bíða til næstu jól...

Kaspur: Eg skal fegin royna at fáa skil á, hvar ið posin er. *(hyggur upp á jólamannin)*

Jólamað.: Áh, tímir tú, Kaspur. Tú ert ein fittur drongur. So nú kann eg fara at hvíla meg eina lítla løtu.

Prinsessan: Ja, kom tú bara við mær, jólamaðurin. Og Kaspur, finnur tú posan, gloym so ikki at hyggja í hann, um ein kettlingur er til mín.

Kaspur: Ja, tað skalt tú líta á! *(øll fara)*

2. partur

Kaspur: *(gongur í ring)* Nú havi eg skjótt leitað í fleiri tímar, og enn havi eg ikki borið eygað við posan. Hevði eg bara ongantíð havt lovað at fara at leita eftir honum, tí nú verða tey avgjørt kedd, um eg komi heim aftur við ongum.

(Ein kettlingur kemur ímóti Kaspuri) Nei, er tað ikki kettlingurin hjá prinsessuni, ið kemur har. Kom higar, kisk, kisk, kisk..

(Kettlingurin roynir at sleppa fram við Kaspuri, men hann tekur í halan á honum) Nú skalt tú ikki verða bangin, eg skal bara vita, hvaðani tú kemur. Sum sporini, sum tú hevur gjørt í kavan, eru fitt. Nú fara vit at ganga eftir slóðini. So fáa vit at vita, um tú ert lopin úr posanum hjá jólamanninum ella ikki. *(Kettlingurin fylgist við Kaspuri út av pallinum).*

Jansson: *(við posanum hjá jólamanninum á bakinum, hart syngjandi)* Nú eru jól aftur, nú eru jól aftur, tá skulu øll verða glað. *(Steðgar brádliga, tá ið hann sær Kaspur og kettuna koma ímóti sær)*

Kaspur: Hvat í allari víðu verð? Er tað tjóvurin Jansson, sum er á ferð sjálvan jólaaftan. Sig mær, Jansson, hvar fert tú, og hvat hevur tú í hasum posanum?

Jansson: *(Smæðin og smoykin)* Halló, Kaspur, eg eri bara farin út at spáka, ein jólatúr, skuldi eg kanska sagt. Hvat var tað, tú segði, tosaði tú ikki um ein posa? Eg havi ongan posa sæð.

Kaspur: Jú, eg tosaði um handa posan, tú hevur á bakinum, sjálvandi.

Jansson: Á bakinum, eg havi einki á bakinum. *(Roynir at venda sær, so Kaspur einki skal síggja)*

Kaspur: Jú, tað hevur tú, vend tær og lat meg síggja. *(Jansson roynir framvegis at krógva posan, sum hann hevur á bakinum)*

Jansson: Eg veit ikki, hvat tú tosar um. *(Vendir sær, so Kaspur fær fatur á posanum)*

Kaspur: Tað er henda posan, ið eg tosi um. *(Loysir posan og hyggur niður í hann)* Nei, hygg, hann er fullur av gávum. Hetta er posin hjá jólamanninum, sum tú hevur stolið, Jansson!

Jansson: *(smoykin)* Eg veit tað væl, Kaspur. Men eg... eg... eg ætlaði ikki at stjala hann. Tað mást tú ikki halda. Tað var bara tað, at.. at.. at.. skilur tú.. at eg vildi so fegin vera jólamaður, bara eina ferð, bara í ár...

Kaspur: So, tað vildi tú, Jansson? Men tað mátti ikki verið neyðugt bara at stolið posan hjá jólamanninum.

Jansson: Nei, men eg hugsaði als ikki um tað. Men so sá eg, at posin hekk á sleðuni hjá jólamanninum. Jólamaðurin var farin inn í eini hús við jólapakkum – eg fái so ongantíð jólapakkar – og so hugsaði eg, at øllum børnum dáma væl jólamannin – ja, so vildi eg so ógvuliga fegin royna at vera jólamaður, tí so kanska øllum børnunum dámdi meg, tá ið eg kom við jólapakkum til teirra.

Kaspur: *(Tekur posan fram)* Kom við mær, Jansson. Nú fara vit yvir til tann rætta jólamannin.

Jansson: Verði eg so ikki settur í fongsul, Kaspur?

Kaspur: Nei, Jansson, tað verður tú ikki. Eg havi eitt nógv betri hugskot. *(Báðir fara)*

3. partur

Jólamaðurin og prinsessan standa og bíða. Kaspur og tjóvurin Jansson koma inn.

Kaspur: Halló, her eru vit aftur. Og vit hava bæði kettlingin hjá prinsessuni og posan hjá jólamanninum við okkum.

Prinsessan: Túsund takk, Kaspur. Sum tú ert fittur. Tað hevur tú nú altíð verið. Nei, hygg hasin fitti kettlingurin. *(Hon kínir honum)* Nei, sum hann er fittur.

Jólamað.: Takk fyri, Kaspur. Tað var gott, at eg fekk posan aftur. Nú kann eg fara við jólagávum til børnini. Eg má skunda mær, so eg ikki verði ov seinur.

Kaspur: Ja, men bíða mær eitt sindur. Eg segði við Jansson í áðni, at eg hevði fingið eitt gott hugskot, og nú verður tú noyddur at bíða, til eg havi sagt tær frá tí.

Jólamað.: Ja, men skunda tær nú, Kaspur. Tað verður skjótt myrkt, og eg eri longu ov seinur.

Kaspur: Ja, tað er júst tað, eg ætli at hjálpa tær við. Jansson er her, og eg eri vísur í, at hann fegin vildi komið við tær á sleðuni og hjálpt tær at fingið jólagávurnar út rættstundis.

Jólamað.: Hevur tú hug at koma við, Jansson?

Jansson: Ja, *tað* havi eg. Stóra tøkk, Kaspur og jólamaðurin. Kaspur, tú skalt fáa ta fyrstu jólagávuna úr posanum. *(Tekur ein pakka upp úr posanum og gevur Kaspuri hann)*

Kaspur: Takk skalt tú hava og góða ferð. Nú fari eg inn at pakka upp. Farvæl børn og gleðilig jól øll somul.